# Fýra nýggjar barnabøkur

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út fýra nýggjar bøkur. Talan er um smábarnabøkurnar Glitrandi, skróvandi talbókin hjá Malju eftir L. Cousins, og Jólini hjá Flekk eftir Eric Hill. Ein barnabók, ið eitur Ein hundur, ein ketta og ein mús eftir Bárð Jákupsson, og kenda ævintýrið Aladdin og gandalampan, ið Philip Pullman hevur endursagt.

Hetta er tíðin, tá ið nógvar nýggjar bøkur koma á marknaðin. Heldur ikki í ár er nakað undantak í so máta, og nú hevur Bókadeild Føroya Lærarafelags útgivið ikki minni enn fýra barnabøkur.



**Aladdin á fyrsta sinni á føroyskum**

Bókin um glitrandi, skróvandi talbólkina hjá Malju er ein upplivingarbók til tey smáu. Øll børn, sum eru góð við Malju, fara at gleðast um hesa litføgru talbókina. Bókin er best egnað til tey 2-3 ára gomlu, hon kostar 80 krónur í bókabúðunum. Tað er Niels Jákup Thomsen, sum hevur týtt úr enskum.

Jólini hjá Flekk er fitt bók til tey heilt smáu. Hon hevur litfagrar myndir og er prentað á haldgott papp. Hon kostar 50 krónur í bókabúðunum, og tað er Eyðna Magnussen, ið hevur týtt úr enskum.

Bókin ein hundur, ein ketta og ein mús er fyrsta royndin hjá Bárði Jákupssyni sum barnabókahøvundur. Bárður hevur í mong ár teknað til barnabøkur, men hesaferð eigur hann so eisini orðini. Bókin er væl egnað til tey 4-7 ára gomlu og kostar 95 krónur í bókabúðunum.

Fyri fyrstu ferð nakrantíð er klassiska ævintýrið um Aladdin og gandalampuna týtt til føroyskt. Tað er Gunnar Hoydal, ið hevur týtt. Bókin er í serstakliga vakrari útgávu. Hon er 68 síður til støddar, sera vakurt innbundin og kostar 150 krónur í bókabúðunum.

**tn**

# Jólahugni sum í gomlum døgum

**Um vikuskiftið skipar Fornminnissavnið fyri jólahugna heima á Garði í Hoyvík**

**Tíðindaskriv**
*frá Føroya Fornminnissavni*



*Talan verður um »gamaldags« jólahugna á Hoyíksgarði um vikuskiftið*

Í hesum myrku døgum upp undir jól er skundur á fólki. Runnið verður úr einum handli aftur í annan. Tað er so mangt, ein skal náa undan jólum.

Tí kann tað hugnaligt umhvørvið kring útisavnið hjá Fornminnissavninum við Hoyvíkina hava eina øðrvísi meira friðsæla uppliving at bjóða foreldrum og børnum, ommum og abbum og øðrum við, nú vit fjórða árið á rað skipa fyri jólahugna heima á Garði í Hoyvík hetta seinasta vikuskiftið fyri jól.

Inni í roykstovuni í Hoyvíksgarði er kynt við torvi í komfýrinum, bakaður verður onkur forkunnugur jólabakstur, borðreitt er við siðbundnum føroyskum mati, og blíðar konur stákast innandura.

Ávísar tíðir hoyrist sermerktur tónleikur úr stovuni. Hetta eru 6 tónleikarar, sum spæla nakað av tí, sum Jens Christian Svabo skrivaði í nótabók sína einaferð síðst í 1700-talinum. Henda nótabók varð í 1928 funnin á loftinum í Pætursastovu í Havn. Nú royna vit at fanga og endurskapa eitt sindur av tí dámi, sum valdaði á døgum Svabos í eini stovu í Havn fyri umleið 200 árum síðani.

Úti í stovu verða jólabrøv skrivað, sjálvandi við fjøðurpenni og blekki.

Aðrar tíðir hoyrast onnur ljóð úr stovuni. Nú eru tað tvær, sum syngja gomul skjaldur úr Funningi.

Uttandura hava børnini úr at gera. Summi tuska runt á granskingarferð at leita eftir vættrum ella royna at gera bond og tog í hoyggjhúsinum. Onnur standa í bíðirøð fyri at royna nakað so spennandi sum at sleppa at ríða á teimum sermerktu og fittu føroyskum rossunum.

Kiwanis selur jólatrø í túninum og skapar á tann hátt aftur í ár jólahugna í útisavninum.

Roykur kemur úr skorsteinum á smiðjuni, tí smiðurin hevur kynt í essuni og er farin at smíða tað gløðandi jarnið til einhvønn prýðiligan lut.

Um kalt er úti, er gott at koma innum í turkihúsinum og keypa sær ein kaffi- ella temunn ella saft og okkurt jólaligt og gott afturvið. Heimavirkaðir lutir eru eisini at fáa í turkihúsinum.

Fornminnissavnið loyvir sær at taka 20 kr frá teimum vaksnu til alt tiltakið. Atgongumerkið inniheldur samstundis skránna, kortmynd yvir útisavnið og upplýsingar um føroysk ross og um Svabotónleikin.

merko JÓLAKALENDARIN

Fríggjadagur 17. desember og leygardagur 18. desember 2004

Culottusteik fyri kg.



49⁹⁵

PACIFIC rækjur 150 gram



12⁹⁵

GAMMELDAWS reyðkál 900 gram



10⁹⁵



SPURNINGUR

Hvussu æt maðurin við rithøvundanavninum Heðin Brú ?

Tilboðið er bert galdandi frí. 17. des. og ley. 18. des. 2004

SVAR

Drigið verður 29. des. millum allar innkomnar seðlar í jólamánaðinum. Vinningurin er ein Apex ferðaseðil til Danmarkar (aftur og fram) íroknað ferðaavgjald. Seðilin kann avleverast við kassan í einum av MERKO handlunum



NAVN & TELEFON NUMMAR